# Ein annar Motzfeldt

Tá grønlendska Landstingið í morgin fer at velja annan formann fyri Jonathan Motzfeldt, er tað ikki óhugsandi, at tað verður ein annar Motzfeldt, sum verður valdur. Í hvussu er hava Demokratarnir skotið upp at velja fyrrverandi IA-formannin Josef Motzfeldt. Formaðurin í Atassut, Finn Karlsen, sigur við Sermitsiaq, at hann hevur einki ímóti, at formaðurin er úr einum flokki uttan fyri samgonguna. Bara hann kann savna tingið.



# Eksem av fartelefonum

Ein nýggj kanning vísir, at fleiri fartelefonir lata nikkel frá sær, og hetta kann í ringasta føri elva til eksem. Tað er Videncenter for Allergi, sum hevur kannað 41 telefonir frá tveimum stórum fyritøkum í USA. Heili átta av hesum telefonunum lótu nikkel frá sær, og hetta kann elva til eksem. Nikkeleksemið er fyrst og fremst at síggja á støðunum, sum blanka metallið nertir við: á oyrunum og kjálkanum. So tað er møguleiki fyri, at tú kanst fáa reyðar kjálkar av telefonini. Tað ber ikki til at síggja, um ein telefon inniheldur nikkel, so um ein skal finna útav hesum, er ein noyddur at ringja til framleigarin, ella gera eina nikkelroynd við telefonini sjálvur.

*Kelda: www.123.fo*

# hevur vit og skil

við at sleppa fram at.

- Spyr teir, sum sigla, hvat teir halda um prísviðurskifti, sigur stjórin, sum ikki heldur, at menn yvirhøvur eru ónøgdir við fiskaprísirnar og prísviðurskiftini annars.

Fiskaseljarin vísti á, at nú Kósin og Faroe Seafood liggja á einum so stórum parti av ráfiskinum, er vandin eisini tann, at smáir fiskaframleiðarar lítlan og ongan kjans hava at blanda seg upp í kappingina um fiskin.

- Eg haldi, at myndugleikarnir áttu at broytt lógina um vinnuligan fiskiskap aftur, soleiðis at allur fiskur, sum verður landaður í Føroyum, verður seldur um uppboðssølu, segði fiskaseljarin, sum legði aftrat, at soleiðis, sum støðan er, kunnu skip selja veiðina, har tey vilja, og tað er hetta, sum nú sæst aftur í fiskaprísunum hjá ávísum skipum.

Fiskaseljarin heldur ikki, at núverandi skipan er nóg góð til tess at tryggja rættan avreiðingarprís og neyðuga kapping um fiskin.

- Útboðið við upsa er ikki alment, og keyparar hava ikki somu møguleikar og atgongd til fiskin. Hetta gongur útyvir kappingina og soleiðis eisini út yvir inntøkurnar hjá skipum og manning, sigur hann.



*Maru Seafood eigur tilsamans átta skip, seks ísfiskatrolarar og tvey línuskip. Nónhamar er eitt av hesum skipum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Steintór eigur størstu lastina

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið tú skrivar um fiskivinnu og metstór tøl, er skjótt, at tú kanst fara skeivur. Oftast kemur onkur, ið veit um onnur tøl, sum eru størri enn tey, tú áður hevur nevnt – og visti um at siga

Í heyst høvdu vit grein í Sosialinum um størstu ísfiskalastirnar, sum føroysk skip hava veitt og landað í Føroyum.

Djúpvatnstrolararnir Suðringur og Roc Amadour vórðu nevndir, ið báðir høvdu ført lastir til lands, sum vigaðu meira enn 500.000 pund.

Í sínari tíð høvdu skipini fiskin í krubbum – og ikki í kassum ella kørum, og tá fekst meira fiskur í lastina.

Sosialurin hevur nú frætt, at lastirnar hjá Roc Amadour og Suðringi ikki eru tær størstu ísfiskalastirnar, sum eru landaðar í Føroyum.

Umborð á djúpvatnstrolaranum Steintóri í Hvalba hongur ein avreiðingarseðil, sum er dagfestur 10. mai í 1988.

Avreiðingin hendan dagin ljóðar upp á 319 tons, sum er 638.000 pund, megin parturin kongafiskur.

Skipari hendan túrin var vágbingurin Petur Mikkelsen, og sagt verður, at hetta er størsta ísfiskalast, sum ein lemmatrolari hevur fiskað í føroyskum sjógvi.

Tá ið Steintór kom aftur av hesum túri, vóru menn sum vera man spentir eftir at vita, hvat lastin mundi fara at viga. Teir gjørdu eina innanhýsis kapping, har hvør maður setti navn og tonsatal á hvør sín lepa. Tann, sum gjørdist nærmastur røttu vektini, skuldi tá fáa ein 100 krónuseðil frá hvørjum manni.

Gitingarnar vóru nógvar – alt frá 260 tonsum upp í eini 300 tons, og vinnari gjørdist Høgni Muller, sum gitti 300 tons.

Tá ið avtornaði vá lastin heili 319 tons.

Høgni Müller, sum gjørdist nakrar hundrað krónur ríkari hendan dagin í 1988, siglir enn í dag við Steintóri og er soleiðis eisini elstur av manningini.

# Vestmenningur og Fram seldu væl í Scrabster

**Eftir at hava landað í Skotlandi seinasta hósdag, fóru skipini útaftur beinanvegin, og longu nú eru tey við at verða full undir lúkurnar aftur**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta hósdag landaðu og seldu ísfiskatrolararnir Vestmenningur og Fram í Scrabster í Skotlandi.

Skipini høvdu umleið 200.000 pund av upsa, sum tey fingu 8 krónur fyri kilo netto.

Hetta er góður upsaprísur.

Nakað var av hvítum fiski, sum seldi sera væl, og samanlagt høvdu Vestmenningur og Fram eina góða sølu í Scrabster.

Tað var felagið P/F Thomson, sum skipaði fyri søluni.

Tá ið Vestmenningur og Fram høvdu lagt veiðina upp í Scrabster, fóru teir til fiskiskap aftur, og nú upsafiskiskapurin undir Føroyum er so góður í løtuni, hava skipini longu fingið upp í aftur.

Ætlandi landa tey í morgin.



*Ísfiskatrolararnir Vestmenningur og Fram, sum seldu í Scrabster fyri viku síðan, høvdu góða sølu. Upsin fór fyri 8 krónur kilo netto, og hvíti fiskurin seldi sera væl*